gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðadeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Frelstir í trúnni

## *Oddagrein*

Umhvørvismaðurin Paul Watson liggur í hesum døgum og roynir at elva til rok í føroyskum sjógvi. Meðan ávísur føroyskur politikari gongur og tosar um, at Watson er danskt málsøki — nakað sum eingin hevði tørv á at siga í 1986 — so kunnu vit hugleiða eitt sindur um hendan Watson.

Watson hevur sambært fjølmiðlum lisið kommunikatión á universiteti. Hann dugir væl at tosa við fjølmiðlar og onnur og fær harvið umvent nakað av fólki til sína søk. Hesin sami Watson kemur so til Føroya og fortelur føroyingum, at teir eru ómoralskir, ósiviliseraðir, og at teir bróta altjóða lóg. Tað má sigast at vera eitt sindur ódámligt, at ein frammandamaður kemur inn í føroyskan sjógv og sleingir so grovar ákærur móti okkum føroyingum.

Hóast Watson fær umvent nøkur, tíbetur ikki øll, í sínum heimlandi, so nytta hansara kommunikatiónseginleikar ikki nógv í Føroyum. Trupulleikin hjá Watson er, at hann og hansara eru frelst í sínari hugsan um føroyska barbarismu. So at siga hvørt einasta mansbarn í Føroyum harímillum eisini Føroya Landsstýri og Føroya Løgting eru á einum máli um, at krøvini, ið Watson setir eru sera órímilig. Hóast hettar, so steðgar maðurin ikki á og hugsar um, um hann kanska er ov framligur í sínum krøvum ella roynir at síggja spurningin frá sjónarmiðunum hjá mótpartinum. Grundin til, at hann ikki ger hettar er, at hann er frelstur í síni søk, og einki vit føroyingar siga ella gera kunnu broyta hugsan ella ætlan hansara.

Vónandi verður ikki rok burturúr Watson vitjanina hesaferð. Rok og fjølmiðlaumtala er tað, ið Sea Sheperd felagsskapurin livir av. Nógv fjølmiðlafólk eru umborð á Ocean Warrior, og onkur av teimum skilti ikki rættiliga, hví tey ikki sluppu á land í Føroyum, men tað má sigast at vera løgið at ferðast á einum skipi við einum skipara, ið tey vita hevur sokkið hvalabátar og ikki kann sleppa inn í nakað Norðurland. Onkur átti ivaleyst at forbarmað seg yvir hesi fólk og sent teimum eina ferðaætlan hjá Atlantsflog ella Smyril Line fyri at vísa teimum á farleiðir til Føroya, um tey hava hug at hitta føroyingar og síggja málið úr einum føroyskum sjónarhorni.

Grindamálið er eitt mál, har føroyingar standa sum ein maður. Kunning er góð, men vit mugu bert staðfesta, at í hvalaspurninginum eins og í øðrum spurningum eru fólk sum Watson, ið eru frelst í málinum, soleiðis at einki, ið gjørt ella sagt verður, rínir við. Ein maður sum Watson dugir eftir øllum at døma ikki at síggja málið við føroyskum eygum, hóast ein heil tjóð tykist vera samd — bara tað í sær sjálvum átti at verið nóg mikið til at fingið slíkar at steðga á og hugsa seg um enn einaferð.

***Sosialurin***



# Umfatandi kanning av alilaksi

*Fóðurframleiðarin EWOS og norski granskingarstovnurin Akvaforsk fara nú í juli undir eina umfatandi góðskukanning av føroyskum alilaksi. Hetta er tann størsta og mest umfatandi kanningin av laksi í Føroyum nakrantíð, og hon skal millum annað vísa broytingarnar í laksinum yvir eitt longri tíðarskeið*

JÓGVAN HUGO GARDAR, OSLO

Í farnu viku gjørdu fóðurfyritøkan EWOS og norski granskingarstovnurin Akvaforsk eina avtalu um eina umfatandi góðskukanning av føroyskum alilaksi. Kanningin fer fram í tvey ár.

Atli Gregersen, umboðsmaður fyri EWOS í Føroyum, sigur, at hetta er ein kanning, sum tey hava havt í umbúna eina tíð, og at nú verður farið í gongd við hana.

- Vit hava í nógv ár gjørt kanningar av føroyska alilaksinum, men hetta hevur oftast verið royndir sum eru tiknar í samband við tøku. Men nú vilja vit fylgja laksinum í tvey ár. Millum annað vilja vit taka royndir av vár- og heystsmoltinum í ár, og so fylgja tí.

**Betri mynd av laksinum**

Umstøðurnar at gera eina so umfatandi kanning eru ikki í Føroyum. Tí hevur EWOS leitað sær hjálp hjá norska granskingarstovninum Akvaforsk, ið liggur í Ås uttan fyri Oslo. Ein av granskarunum har er Turið Mørkøre úr Klaksvík

- Við at fylgja við laksinum í eitt longri tíðarskeið, kunnu vit meir nágreiniliga finna út av, hvussu góðskan á laksinum er, og hvørjar broytingar fara fram frá árstíð til árstíð, sigur Turið Mørkøre.

Hon verður ein av teimum, sum skal gera kanningar og vera við til at geva EWOS eina betri mynd av føroyska alilaksinum. Men hesi úrslit vilja í aðru atløgu koma føroyskum alarum til góða, tí EWOS kann og vil brúka kanningarúrslitini til at tilpassa fóðurið til føroysku alararnar.

- Líknandi kanningar í Noregi hava víst, at laksurin eigur at fáa ymiskt fóður, tá tað er heitt í sjónum samanborið við fóður sum verður givið tá tað er kaldari í sjónum. Ymiskt fóður økir møguleikan fyri at fáa best møguligan vøkstur og góðsku á laksinum. Eisini eigur framleiðsluhátturin at lagast eftir, hvar alibrúkini liggja. Árstíðin vísir seg eisini at hava nógv at siga fyri góðskuna, sigur Turið Mørkøre.

Kanningar skulu sum sagt gerast av ársins vár- og heystsmolti. Kanningin byrjar nú í juli, og síðani skulu kanningar gerast av laksinum annanhvønn mánað í umleið 18 mánaðir.

Tey sum koma at standa fyri kanningunum eru fyri EWOS Atli Gregersen og Sólrun Gregersen. Fyri Akvaforsk skulu fyrst og fremst norðmaðurin Kjell-Arne Rørvik og Turið Mørkøre standa fyri kanningunum.

# Ólavsøkukórið farið til verka

Í byrjandi ólavsøkuhýri møttu kórsangarar til venjingar í Kommunuskúlanum í Havn seinasta hóskvøld.

Kórið var væl mannað – har mundi vera yvir hundrað í tali –, men nú til hetta serliga merkishøvið við m. a. nýggjari kantatu kundi tað verið ynskiligt, at kórið var enn fjølmentari, og at kórsangarar av bygd vístu hesum felagsføroyska kórtiltaki eins stóran áhuga og sangarar úr Havn.

Venjing var í Kommunuskúlanum sunnudagin kl. 16.00 og somu tíð teir báðar fylgjandi sunnudagarnar. Roknast kann við, at tað tá er komið á mál við fyrireikandi venjingunum; men kenna sangararnir sær tørv á tí, verður ein seinast a venjing mikukvøldið 26. juli kl. 19.30, sigur Kórsamband Føroya.

**Arnbjørn R. Thomsen**



Arnbjørn er brádliga burtur. Fattur idealistur og sterk persónmenska var hann. Ein rættur maður er farin.

**Valdemar Dalsgaard**

**Tøkk**

Hjartaliga takk til tykkum øll, sum gleddu okkum á gullbrúdleypsdegi okkara tann 17. juni. Harrin signi tykkum.

**Sofía og Johannes Jacobsen**



# Hvalahirðin Watson sightseeing vestanfyri

*Svarta skipið við sjórænaraflagginum frammi í gron sigldi fyrrapartin í gjár ótarnað millum vestaru oyggjarnar*

DIA MIDJORD

– Vit kunnu ikki avdúka okkara móttrekk.

Hetta svar fingu vit á Politigarðinum í Havn fyrrapartin í gjár. Vit ringdu í sambandi við, at Ocean Warrior beint eftir hálvgum ellivu fór grøvandi vestur gjøgnum Hestfjørð og helt leiðina fram norð gjøgnum Vestmannasund.

Frá politinum fingu vit at vita, at Paul Watson og Ocean Warrior ikki hava fingið loyvið at fara innum terretorial-markið. Sjóverjuskip sást ikki fylgja í hølunum á hvalahirðanum, men sjóverjutyrlan fór stutt eftir flúgvandi vestureftir.

**Brotið útlendingalógina**

Leygardagin var løgreglan umborð á Ocean Warrior og handaði skiparanum eina bót upp á 50.000 krónur. Bótina hevur Paul Watson fingið, tí hann stundum hevur verið innan fyri terretorialmarkið og eiheldur hevur aktað boðum frá løgregluni.

Vit ringdu fyrrapartin í gjár vestur í Vágar at frætta, um grindaboð vóru, men tað vistu tey onki um. Sostatt er tað ikki grindaboð, ið hevur lokkað Watson inn millum oyggjarnar.

Tað kann sjálvandi vera, at Paul Watson hevur ætlað sær inn at gjalda bótina. Ávegis hevur hann fingið kaldar føtur og hevur tískil skundað sær út aftur í altjóða sjógv. Ella spælir hann hund við okkara myndugleikar. Hvussu er og ikki, Paul Watson ætlar sær ikki at leggja kongin. Og løgreglan eigir næsta leikin.



*Fyrrapartin í gjár sigldi Paul Watson ótarnaður ein túr vestur gjøgnum Hestfjørð og norð gjøgnum Vestmannasund*

# – Uppskotið er ikki samtykt

*Óla Jákup Rólantsson, programleiðari á Rás 2, vísir aftur, at uppskotið hjá teimum er vrakað*

DIA MIDJORD

– Tá tað verður sagt, at okkara uppskot er vrakað, so er tað ikki rætt. Sannleikin er heldur, at uppskotið ikki er samtykt, sigur Óla Jákup Rólantsson, programleiðari á Rás 2.

– Tá tit so skriva, at uppskotið ikki er borðbært, so er hetta heilt burturvið. Kommunan hevur langt síðan boðað frá og er eisini farin at brúka Rás 2, sum lýsingarmiðil á jøvnum føti við ÚF, sigur programleiðarin á Rás 2.

**Mugu hava stuðul**

Rás 2 fær ongan almennan stuðul og kann heldur ikki krevja lurtaragjald. Tískil hevur Rás 2 bjóðað Tórshavnar kommunu at gera brúk av hesum miðli. Upphæddin á eina krónu fyri hvønn íbúgva um mánaðin er bert vegleiðandi, tí býráðslimir ynsktu at fáa okkurt tal á borðið.

Programleiðarin vísir á, at bløðini, undantikið Oyggjatíðindi, øll fáa stuðul á einhvønn hátt.

– Skal tað koma til skarpskeringar, hvat peningur verður brúktur til, so verða borgarar í Tórshavnar kommunu árliga við pantihóttan tvingaðir at gjalda Útvarpi Føroya 9,5 milliónir í lurtaragjaldi. Og harnæst var eingin trupulleiki hjá kommununi at lata tvær milliónir til ein sendara, so kollfirðingar kunnu síggja m.a. MTV, leggur Óla Jákup Rólantsson aftrat.

Hann heldur tískil, at ein stuðul á 200 túsund krónur, har kommunan fær nakað veruligt afturfyri, ikki er annað enn piparnøtur og slettis einki forgjørt í.

– Vit hava ein miðil, har hvør senditími kostar. Hesin skal fyllast og fíggjast. Vit bjóða kommununi at brúka henda møguleika, so einfalt er tað, sigur Óla Jákup Rólantsson, programleiðari á Rás 2.

# Fáir læknar og fitt av sjúkrasystrum

*Norðurlendsk hagtøl innan heilsuverkið vísa, at vit hava nógvar sjúkrasystrar í Føroyum, meðan talið av læknum og sjúkrahjálparum er lágt*

DIA MIDJORD

Sammeta vit við onnur Norðurlond, so er sjúkrahúsverkið sera væl mannað við sjúkrasystrum. Umroknað til 100 túsund íbúgvar, so hava vit 635 sjúkrasystrar á okkara sjúkrahúsum. Hetta tal er tað hægsta í Norðurlondum. Í Danmark er talið 516, í Noregi 521 og í Íslandi 468.

Um vit sammeta talið av læknum fyri Norðurlond, so eru vit í Føroyum ikki so væl fyri. Umroknað til 100 túsund íbúgvar eru 125 læknar á sjúkrahúsunum. Hetta er lægsta talið í norðurlondum. 184 læknar eru til sama íbúgvartal í Danmark, 166 eru í Noregi og 204 eru í Íslandi.

Sammeta vit tølini fyri sjúkrahjálparar/pleygarar, so liggja vit langt undir øðrum Norðurlondum. 109 eru til 100 túsund íbúgvar. Taka vit eitt nú og sammeta við Grønland, so eru har 305 sjúkrahjálparar og í Danmark er talið 257.

**Bókin komin**

Tølini, ið vit hava nevnt omanfyri, eru tikin úr bókini „Heilsuhagtøl í Norðurlondum", sum Nordisk Medicinalstatistisk Komité skipar fyri.

– Sum heild kann sigast, at vit líkjast øðrum Norðurlondum. Av tí at londini hava ymsar skipanir á sjúkrahúsunum, har nøkur hava sjúklingar liggjandi leingi, onnur kanska stytri og ofta, so ber ikki so væl til at sammeta øll tølini. Men nøkur eru faktatøl og tey kunnu sjálvandi sammetast, sigur Pál Weihe, læknastjóri.

– Tølini kunnu geva okkum eina hóming av, hvussu støðan eitt nú er á nøkrum økjum, sigur Pál Weihe, ið fegnast um at vit nú hava fingið hagtøl at virka innan føroyska heilsuverkið.

Og sambært bókini, ið hevur tøl fyri flest øll økir, so liggja Finnland og Føroyar niðast, tá umræður útreiðslur til heilsuverkið. Her liggja danir klárt á odda, meðan íslendingar og norðmenn koma teimum á baki.

# Svar kemur eftir summarfrítíðina

*Milliónirnar til umvæling og annað í Koltri eru framvegis í Danmark. Ný Carlsberg Grunnurin er farin í summarfrí og lovar at taka málið upp seinni*

DIA MIDJORD

Landsstýrismaðurin Høgni Hoydal fær ikki svar upp á skriv sítt til Ný Carlsberg Grunnin, tí hesin er farin í summarfrí.

Í einum skrivi til landsstýrismannin, sum hevur játtað at taka sær av málinum, verður sagt, at grunnurin er farin í summarfrí. Í brævinum til Høgna Hoydal stendur, at grunnurin fer at viðgera málið eftir summarfrítíðina.

Tað er skrivið til festaran í Koltri, har milliónirnar verða tiknar aftur, ið hevur fingið landsstýrismannin at leggja uppí. Hann heldur, at grunnurin í síni grundgeving sáar ivað um politiska myndugleikan í Føroyum og vil hava eina neyvari frágreiðing.

